LM-108/2020

Gunnleyg Árnafjall

Fra: Atli Suni Leo
Sendt: mikudagur, 17. februar 2021 15:48
Til: Gunnleyg Árnafjall
Cc: Bjarni Askham Bjarnason; Herálvur Joensen; VMR-Journal; Fíggjarmálaráðið
Emne: Hoyringssvar til uppskot til verklagslóg um at byggja umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið
Vedhæftede filer: 21_01190-5 Uppskot til verklagslóg um at byggja umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið 225172_214798_0.DOCX

Opfølgningsflag: Flag for follow up
Flagstatus: Afmærket

Hey Gunnleyg

Fíggjarmálaráðið hevur hesar viðmerkingar:

Fíggjarmálaráðið heldur seg til, at verkætlanir skulu vera prosjekteraðar í minsta lagi fram til verkætlanaruppskot, áðrenn verklagslóg verður løgd fyri Løgtingið.
Hetta kemst av, at tá fæst óvissan um byggikostnaðin niður á eitt støði, sum kann góðtakast.

Soleiðis sum henda verkætlan er fyrireikað, har tilboðsveitararnir sum partur av tilboðnum prosjektera fram til verkætlanaruppskot, so verður tað ikki fyrrenn tilboðini koma inn, at kostnaðargrundarlagið í minsta lagi er bygt á verkætlanaruppskot.

Tískil verður frámælt, at verklagslógin verður løgd fyri Løgtingið áðrenn tilboðini eru komin inn og viðgjørd.

Vh Atli Suni Leo
Ráðgevi

Fra: Gunnleyg Árnafjall <GunnleygA@uvmr.fo>
Sendt: 10. februar 2021 15:44
Til: Atli Suni Leo <Atli@fmr.fo>
Cc: Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>
Emne: verður sent tykkum til hoyringar Uppskot til verklagslóg um at byggja umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið

Góði Atli

Hjálagt er verklagslóg um at byggja umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið. Málið hevur skund og tí hevði verið gott um tit kundu sent okkum tykkara viðmerkingar skjótt.

Vinarliga

gunnleyg